## Sparkivøllur til Skálavíkar



Í eina tíð hevur verið arbeitt við at gera nýggja sparkivøllin í Skálavík lidnan, og nú er arbeiði endiliga liðugt. Fríggjadagin í farnu viku var UEFA-sparkivøllurin avhendaður til bygdafólki í Skálavík. Tað var Karl Vidtveldt umboðandi føroyska fótbóltssambandið, sum stóð fyri hesum. Sama dag, sum vøllurin bleiv avhendur til bygdarfólki í Skálavík, var bygdin vertur fyri Sandoyarstevnuni.

## Ferðslubroytingar á Eystanstevnu

Frá mikukvøldinum 13. juni kl. 19.00 til sunnukvøldið 17. juni klokkan 23.00 verður ongin gjøgnumkoyring á Stevnuøkinum. Heiðavegurin verður sostatt stongdur frá Jungmann og suður til Hotel Runavík. Í hesum sambandi verður ferðslan beind eftir vegnum á kaiøkinum. Tó ber til at koyra til handlar, sum liggja millum Føroya Banka og Brotið. Ferðslubroytingarnar eru uppmerktar á kortinum yvir stevnuøkið.

# Eingin grund til panikk

**Kanningar, sum Tórshavnar Kommuna higartil hevur latið gera av vatninum í høvuðsstaðnum, hava ikki víst, at vatnið er fongt við e.coli ella koliforma bakterium. Nakrir enterokokkar vórðu staðfestir herfyri, men nú bendir einki á, at vatnið er dálkað**

VATNDÁLKING
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*



*Í løtuni er einki, sum bendir á, at drekkivatnið í høvuðsstaðnum er fongt við bakterium*

Viggo Christiansen, sum er vatnmeistari í Tórshavnar Kommunu, sigur, at tá søgur fara at ganga um, at drekkkivatnið er dálkað, gerast fólk sjálvandi órógvað. Liggja fólk um somu tíð við spýggisjúku og leysum lívi, er sannlíkt, at tey halda, at orsøkin er drekkivatnið.

Hann vísir á, at fólk í seinastuni hava ligið við spýggisjúku og leysum lívi, men hetta er ikki bara í Havn, eisini kring landið og eitt nú á Skálafjørðinum, har fleiri fólk hava ligið sjúk.

### Eingin staðfesting

Vatnmeistarin sigur, at herfyri varð staðfest, at nakrir enterokokkar vóru í drekkivatninum í parti av høvuðsstaðnum, men hvørki e.coli ella koliforma bakteriur eru staðfestar í vatngoymslunum í Villingardali ella Havnardali.

- Vit hava ikki havt slíkar trupulleikar við vatninum, síðan vit høvdu eitt brek á reinsiverkinum í Villingardali í fjør heyst, sigur vatnmeistarin.

Hann vísir á, at Tórshavnar Kommuna veit ikki orsøkina til, at enterokokkar vóru funnir fyri umleið 10 døgum síðan, men nú vísa kanningarnar, at vatnið er í lagi.

- Nýggjar kanningar eru nú gjørdar. Faroe Seafood hevur gjørt tvær, og vit hava gjørt eina á Faroe Seafood í Havn og eina á Mjólkarvirkinum fyri at staðfesta, hvussu vorðið er í Eysturbýnum.

Viggo Christiansen sigur, at í løtuni er einki staðfest nakrastaðni.

- Faroe Seafood hevur eisini havt kanningar til dyrkingar seinastu dagarnar, og soleiðis sum eg havi skilt á teimum, sum standa fyri laboratoriunum hjá teimum, hava hesar kanningar ikki staðfest nakað óvanligt hesar seinastu dagarnar, sigur hann.

### Umfatandi kanning

Vatnmeistarin sigur, at Heilsufrøðiliga Starvsstovan skipar fyri, at ein stór kanning av vatninum verður gjørd einaferð um mánaðin, og hendan kanning plagar at verða tikin fyrsta týsdag í hvørjum mánaða.

- Tíggju royndir verða tiknar ymsastaðni í kommununi – og ikki bara í Havn. Hesar royndir verða kannaðar nú, og um einar tríggjar dagar hava vit úrslitini, sigur hann.

Viggo Christiansen vísir á, at hetta er ein reglulig kemisk-og mikrobiologisk kanning, sum er rættiliga umfatandi.

Hann sigur, at Tórshavnar kommuna heldur seg til eina norska skipan, sum merkir, at tá einki vísir seg at verða í einari seinni kanning, sum kemur eftirfylgjandi einari fyrru, verður ikki meira burtur úr mótvegis borgarunum.

- Orsøkin til, at vit hesaferð vendu okkum til stovnar, har heilsuveik fólk og børn eru, var kanningin, sum herfyri vísti, at nakrir enterokokkar vóru staðfestir, sigur vatnmeistarin.

Eftir stóru kanningina, sum nú er tikin á tíggju ymiskum støðum, fæst seinni í hesi vikuni neyvari greiða á, hvussu støðan er.

### Heystið ringast

Viggo Christiansen sigur, at vanliga er heystið ringasta tíð fyri vatnið, tí tá kunnu vit fáa nógv regn, sum dregur skarn frá seyði og fugl oman í vatngoymslurnar.

- Tað er serliga hendan tíðin, sum kann geva trupulleikar, leggur hann aftrat.

## Eingin lækni at hitta

VATN
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Sosialurin royndi allan fyrrapartin at fáa fatur á onkrum av kommunulæknunum í Havn fyri at fáa at vita, um nøkur staðfesting er gjørd, sum sigur, at spýggisjúkan og búkilskan, sum fólk hava drigist við í seinastuni, kann stava frá drekkivatninum.

Vit ringdu til einar fimm av kommunulæknunum, men tíverri eydnaðist okkum ikki at fáa orð á nøkrum teirra.

Teir, sum svaraðu, vóru upptiknir við sjúklingum og onkur vísti á telefonsvarara til aðrar læknar í økinum.

# Illgruni til vatnið

**- Fyrst legðist sonurin sjúkur, og síðan eg sjálvur. Hetta var óbehagiligt. Tað byrjaði við spýggisjúku og síðan búkilsku, sigur havnaborgari, sum herfyri lá sjúkur**

SJÚKA
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

- Eg eri ikki 100% vísur í, at sjúkan stavaði frá vatninum, men eg havi ein sterkan mistanka um tað.

Tað sigur havnaborgari, sum um dagarnar hevur ligið sjúkur.

Hann sigur, at fyrst legðist yngri sonurin sjúkur, og síðan hann sjálvur.

- Sonurin byrjaði at spýggja og fekk síðan búkilsku og nógvan fepur. Seinni legðist eg sjálvur sjúkur, og hetta byrjaði á sama hátt.

Havnaborgarin sigur, at hjá honum byrjaði tað eisini við spýggisjúku og síðan við ringari búkilsku og leysum lívi.

- Eg fekk nakað av fepri, men ikki tað nógva. Eg gjørdist rættiliga ússaligur, spýði nógv og hevði ongan matarlyst. Hetta vant upp á seg yvir einar 3-4 dagar.

Hann sigur, at eftir nøkrum døgum var neyðugt at fara til lækna at fáa heilivág, sum kundi stabilisera tarmar og maga.

- Seinni hoyra vit so, at ávísir trupulleikar hava verið við vatninum í høvuðsstaðnum, og tað er lætt at vera bakklókur.

Havnaborgarin sigur, at hann ikki er 100% vísur í, at tað er drekkivatnið, ið elvdi til sjúkuna, men hann hevur ein mistanka um, at so er.

- Vit hava drukkið ókókað vatn sum vanligt, men vit hava onga staðfesting av, um hetta nú var orsøkin, tí ongar veruligar kanningar eru gjørdar í so máta, sigur hann.

Havnaborgarin heldur, at Tórshavnar kommuna eiga at lata fólk vita, um minsti mistaki er til vatnið.

- Tað ger einki, um sagt verður frá einaferð ov nógv – heldur enn einaferð ov lítið, sigur hann.